# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## 70 ára føðingardagur

Mánadagin 25. juli fylti Helgi Jacobsen í Klaksvík 70 ár. Helgi er ættaður úr Svínoy, sonur Mallu og Edvard Jacobsen, vanliga nevndur Edvard í Svínoy, og er næstelstur av fýra brøðrum.

Helgi er giftur við Oslu, sum er dóttir til Onnu Cathrinu og Fríðrik Heinesen, tey búgva á Selheyggi, eiga børnini Sámal, Eydna og Annfríð, og ommu og abbabørnini eru fýra.

Helgi fór sum ungur í læru hjá Debes Mortensen, skræddara. Eftir lokna útbúgving fór hann at royna sjólívið. Sigldi nógv við trolarum og línuskipum hjá Kjølbro. Helgi var eisini í Grønlandi nógv summur og róði út saman við pápanum, pápabeiggjanum og brøðrunum.

Helgi kom sum ungur til persónliga trúgv á Harran Jesus og hevur sína dagligu gongd í samkomuni Betesda.



Í 1972 byrjaði Helgi at sigla við Barskor í Kallsoynna, og varð hetta ein sigling, ið honum dámdi serstakliga væl, tí her kom hann at kenna nógv fólk, og sjálvur hevur hann eisini røtur í Kallsoynni.

Einaferð miðskeiðis í 80-unum fór Helgi at sigla við Ternuni um Leirvíksfjørð og seinni við Dúgvuni, og er tað serliga frá hesi sigling at flest øll kenna Helga.

Mong eru tey sum minnast á nógvar góðar og skemtiligar løtur í práti við Helga, meðan siglt varð um Leirvíksfjørð.

Heimbygdin Svínoy er honum sera kær, her eigur hann jørð og hevur seyð, og fyri nøkrum árum síðani bygdi hann sær eini hús á Gundaváli, har jørðin liggur. Helgi er nógv úti í Svínoy, og serliga væl dámar honum at hava abbabørnini við út til Svínoyar. Hann gevur sær altíð góðar stundir at taka sær av teimum, øll eru tey serstakliga góð við abban og hann við tey.

Nógvar føðingardagar hevur Helgi verði staddur úti í Svínoy, tí hetta er tíðin tá riggast skal til hoygging, men nú hann rundar tey 70 árini, verður føðingardagurin hildin í heiminum á Selheyggi í Klaksvík.

---

## Ein heilsa til Anne Mette og Leif Hansen

22. juli var brúdleypsdagur hjá Anne Mette og Leif Hansen í Nólsoy.

Byrjað varð við brúðarvígslu í Nólsoyar kirkju, har Heri Joensen við væl valdum orðum vígdi parið. Góður tónleikur og sangur settu sín serliga dám á løtuna.

Veiðslan var hildin í gomlu smoltstøðini úti á Klivum, har Dannebrog og Merkið veitraðu lið um lið í sólskininum. Borðhaldið var merkt av nógvum góðum røðum til bæði Leif og Anne Mette. Ein sera góð veiðsla, har tvær mentanir møttust, tann hjá Anne Mette úr suðurjútlandi og tann føroyska hjá Leif. Síðani var dansað í Royndarhúsinum til tann ljósa morgum.

Góði Leif, tað gleddi meg at vera við at heiðra tykkum henda stóra dag í lívi tykkara. Tú ert ein av mínum allar bestu vinum, og við Anne Mette er lagt til í vinarskaran. Hettar vinarlagið er komið í lag millum annað av felagsáhuga í okkara kvæðamentan.

Góði Leif, tín brennandi áhugi fyri sangi og tónleiki, sum tú eisini hevur nomið tær holla útbúgving ið á flatlondum er til gleði fyri okkum øll, ið kenna teg. Vit í Nólsoyar sangkóri gleða okkum altíð, tá tú kemur at vitja og stuðla kórið. Vónandi koma tú og Anne Mette ofta aftur úr Keypmannahavn at vitja.

Til seinast vil eg ynskja tykkum alt tað besta í framtíðini við vón um at tit ein vakran dag fara at búseta tykkum í Føroyum. Tit hava so nógv gott at geva av.

**Heilsan vinur tykkara**
**Kaj**

---

**Dagurin**

**26. juli, Anna.** Hon var móðir Mariu Moy og var gift við Jójakimi. Halgisøgan sigur frá, at tey komin upp í árini eingi børn fingu, og Jójakim rýmdi frá konuni. Men hann vendi heim aftur, tá ið ein eingil hevði boðað honum, at tey skuldu fáa barn. Og tá bar til.
Hebráiskt navn, ið merkir hin náðaða ella yndi.

## Litmyndir av brúðarpørum í Sosialurin

Vikuskiftis

Sum nakað nýtt seta vit nú allar myndir av brúðarpørum, sum vera sendar til til teigin "Heilsanir", í Vikuskiftis Sosialin í **litum**.

Brúðarmyndirnar koma undir somu treytir sum aðrar myndir til "Heilsan-ir", t.v.s. at tær kosta 30 kr.

***Síðsta freist at lata brúðarmyndirnar inn er hósdag kl. 12.00***

**Sosialurin**

---

†

## Andlát og jarðarferðir

**Marianna Hjalt,** vanliga nevnd Manna, andaðist á Gerðisgarði í Skálavík leygarkvøldið, 87 ára gomul. Jarðarferðin verður kunngjørd seinni.

*Kelda: Kringvarp Føroya*

---

## Tøkk

Tøkk fyri sýnda samkenslu tá pápi, verpápin og abbi okkara

**Simon Johannes Poulsen**
Klaksvík

andaðist og varð jarðaður.

Tøkk tit í heimarøktini.
Tøkk tit á Norðoya Røktarheimi.
Tøkk øll, sum hjálptu til við jarðarferðina.
Tøkk fyri blómur og kransar, og tit, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

**Jacobina og Esbern**

---

## Tøkk

Vit takka hjartaliga fyri sýnda samkenslu, tá elskaði maður, pápi, verpapi, abbi og langabbi

**Joen Pauli Feodor Hammer**

fór heim til Harran.

Takk fyri blómur, kransar og peningagávur til Zarepta.
Takk til øll, ið fylgdu honum til hansara hvíldarstað og øll ið hjálptu til uppá ymiskar mátar.

*Fyri tey avvarðandi*
**Alma Hammer**

---

## Tøkk

Hjartaliga takki eg øllum, ið mintust meg á 75 ára degnum 29. mai.

**Heilsan Anna Johansen**

---

**85 ár**

Í dag, 26. juli fyllir Hanna Ziska, Klaksvík, 85 ár. Hon er burturstødd.